# Stiftsfulltrúi

Eitt spennandi og avbjóðandi starv sum stiftsfulltrúi við Stiftsstjórn Føroya er leyst at seta frá 1. mars 2008 ella skjótast gjørligt.

Umsøkjarin skal vera løgfrøðingur ella hava aðra samfelagsvísindaliga ella fyrisitingarfrøðiliga útbúgving við almennum rætti og fyrisitingarrætti.

Í samstarvi við stiftsstjórnina skipar og leiðir stiftsfulltrúin dagliga arbeiðið á stiftsumsitinginiog er skrivari hjá stiftsstjórnini. Hann ráðgevur eisini biskupi í málum, sum viðvíkja embætisrøkt prestanna, kirkjuráðsvali, próstadømisráðsvali, biskupsvali, kirkjubókaføring, nýtslu av kirkjum v.m.

Fólkakirkjan varð yvirtikin á Ólavsøku, og tann, ið settur verður í starvið, kann tí vænta, at stórar og spennandi uppgávur eru fyri framman, eitt nú at vera við í arbeiðinum at tilevna føroyskar lógir og kunngerðir á kirkjuliga økinum.

Tann, ið verður settur, kemur í stóran mun at mynda starvið saman við biskupi, men má eisini kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum. Góður málsligur førleiki er ein fyrimunur.

Vit ynskja ein starvsfelaga, ið hevur góð samstarvsevni og hug at samskifta, og sum sær møguleikar heldur enn forðingar.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsókn við gjølligum upplýsingum um útbúgving og yrki higartil skulu saman við próvskjølum sendast Føroya Stiftsstjórn, J. Paturssonargøta 20, Postrúm 8, 110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jógvan Fríðriksson, biskup, tlf. 31 19 95.

Umsóknarfreistin er úti fríggjadagin 11. januar 2008 kl. 12.00.

**Føroya Stiftsstjórn**
**J. Paturssonargøta 20**
**Postrúm 8**
**110 Tórshavn**



# Nýggjur fólkaskúli á Hamrinum á Argjum

Tórshavnar kommuna bjóðar við hesum arbeiðstakarum at biðja um undanførleikameting (prækvalifikatión) til luttøku í innbodnari útbjóðing sum høvuðsarbeiðstøka í sambandi við, at byggjast skal nýggjur fólkaskúli á Hamrinum á Argjum. Arbeiðið at byggja skúlan verður skipað eftir partalagsleisti.

**Upplýsingar í sambandi við byggiætlan og útbjóðing**

**Byggiharri**
Tórshavnar kommuna
Vaglið · Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn

**Lýsing av verkætlanini**
Tórshavnar býráð hevur samtykt at byggja nýggjan fólkaskúla á Hamrinum á Argjum. Skúlin verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk við frítíðarskúla til 1.-2. flokk, tilsamans umleið 500 næmingar.

Støddin á skúlanum verður 6.400 m².

1. undirvísingarpartur, t.e. 1.-3. flokkur, er umleið 1200 m², og skal verða liðugur 1. juli 2009. Allur skúlin skal standa liðugur 1. juli 2010.

**Mannagongd fyri útbjóðingini**
Arbeiðstøkan verður útboðin í innbodnari høvuðsarbeiðstøku í undanførleikameting. Útbjóðarin ætlar at heita á 3-5 arbeiðstakarar at geva tilboð. Tilboðið verður grundað á dispositiónsuppskotið. Eftir hetta verður arbeiðstakarin við í framhaldandi projektering í partalagi.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 7. januar 2008.

Saman við umbønini um luttøku skulu sendast upplýsingar um arbeiðstakaran, so metast kann um kravda førleikan hjá fyritøkuni bæði á tí fíggarliga og á tí tekniska økinum.

1. Upplýsingar um fyriskipan og bygnað í fyritøkuni og møguligt samband við móðurfelag.
2. Royndir við líknandi verkætlanum.
3. Váttan um árliga miðaltalið av starvsfólki í fyritøkuni.
4. Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkunum, ið ætlandi verða knýtt at verkætlanini.
5. Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og umhvørvisskipanir hjá fyritøkuni.
6. Upplýsingar um eginogn og javna í roknskapi saman við váttan fyri samlaðu søluna hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.
7. Váttan um trú og heiður.

Um arbeiðstakarin nýtir undirarbeiðstakarar skulu oman fyri nevndu upplýsingar eisini gevast fyri teir.

**Metingarstøðið**
Metingarstøðið, sum er grundarlagið fyri vali av arbeiðstakara: Tilboðið, sum hevur størstan búskaparligan fyrimun.

**Útbjóðingartilfarið**
Útbjóðingartilfarið verður sent út 28. januar 2008.

**Aðrar upplýsingar**
Arbeiðið verður boðið út í Norðurlondum.

Øll skjøl, heiti og frágreiðingar eru á føroyskum, og fyri verkætlanina verða føroysk rættarviðurskifti galdandi.

Eru ivamál, fæst meira at vita frá byggiharrasamskiparanum Eivindi Danielsen, tlf. +298 21 40 37 ella teldupost: eivind@torshavn.fo

**Tórshavnar kommuna**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

# VASKIFÓLK

## til Føroya Handilsskúla í Tórshavn at byrja skjótast møguligt

Søkt verður eftir vaskifólki 18 tímar um vikuna. Vaskað verður í tíðarbilinum kl. 15.00 til 17.30.

Nærri uppslýsingar fáast við at ringja til Zacharias Johansen, húsavørð tlf. 224693.

Løn sambært sáttmála hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Skrivlig umsókn, at senda til:

**Føroya Handilsskúla**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn

# Fólkaflokkurin í Eysturoynni

3. uppstillingarfundur til Løgtingsvalið verður í skúlanum í Funningi
**hóskvøldið 13. desember kl. 19.00**

Eysturoyar Fólkafloksfelag

**Grón**

Tlf 312161
gron@gron.fo
www.gron.fo



**Bestu piparnøturnar fáa tit hjá okkum**